LØGTINGSINS UMBOÐSMAÐUR

Barnaverndartænastan fyri B kommunu

Tórshavn, tann 2. mai 2017
J.Nr.: LUM-25- 17/00032-14
(at tilskila í svari)
Tykkara J.nr.

**Klaga um inntriv hjá barnaverndartænastu í myndugleikan at umsita pening hjá umsorganaryvirtiknum børnum**

Barnaverndartænastan fekk upplýsingar frá eini fyrrverandi fosturmammu, sum hevði illgruna um, at mamman at fyrrverandi fosturbarni hennara hevði brúkt av kontunum hjá barninum. Barnaverndartænastan bað síðani bankar um kontuavrit av kontunum hjá barninum og einum systkini, sum eisini var umsorganaryvirtikið, fyri at síggja nýtsluna á kontunum. Samstundis upplýsti barnaverndartænastan fyri bankunum, at børnini vóru umsorganaryvirtikin.

Foreldur hava vanliga foreldramyndugleika yvir børnum sínum, til børnini verða 18 ár, sbrt. § 1 í Foreldramyndugleikalógini, (anordning nr. 228 af 15. marts 2007 om ikrafttræden for Færøerne af lov om forældremyndighed og samvær), hereftir Fml. Hetta merkir, sbrt. § 2, stk. 1 i Fml., at tann, ið hevur foreldramyndugleikan, skal hava umsorgan fyri barninum og kann taka avgerðir um persónlig viðurskifti hjá barninum við atliti at áhuga og tørvi hjá barninum.

Sbrt. § 1, stk. 1 í Verjumálslógini, (anordning nr. 397 af 20. april 2010 om ikrafttræden for Færøerne af værgemålsloven), hereftir Vml., eru børn og ung undir 18 ár, sum ikki eru gift, ómyndig. Tann, ið hevur foreldramyndugleikan, er verji hjá ómyndiga barni sínum undir 18 ár og virkar vegna barnið í peningaligum viðurskiftum hjá barninum, um ikki annað er ásett, sbrt. § 2, stk. 1 og § 1, stk. 3 í Vml.

Foreldur kunnu sum verjar, í hóskandi vavi og við atliti at støðuni hjá sær sjálvum og barninum, brúka inntøkur hjá barninum til uppihald av barninum, sbrt. § 2, stk. 3 í Fml.

Tó ráða ómyndig sjálvi yvir tí, tey hava forvunnið sær við egnum arbeiði, aftaná at tey eru fylt 15 ár, sbrt. § 42, stk. 1, pkt. 1 í Vml.

Tá eitt barn verður umsorganaryvirtikið eftir Barnaverndarlógini, (løgtingslóg nr. 18 frá 8. mars 2005 um barnavernd, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 139 frá 18. desember 2013), hereftir Bvl., yvirtekur barnaverndarnevndin umsorganarábyrgdina fyri barninum, sbrt. § 21, stk. 1 í Bvl.

Barnaverndarnevndin kann lata umsorganarábyrgdina upp í hendurnar á fosturforeldrunum ella stovninum, har barnið býr, sbrt. § 21, stk. 2 í Bvl.

Sambært viðmerkingunum til § 21 í Bvl. (løgtingsmál nr. 10/2004) fær barnaverndarnevndin ábyrgdina av dagligu umsorganini av barninum í sambandi við umsorganaryvirtøkuna. Tá barnaverndarnevndin hevur latið umsorganarábyrgdin upp í hendurnar á t.d. fosturforeldrum, hava hesi vanligu umsorganarábyrgdina av barninum, so leingi barnið er hjá teimum. Barnaverndarnevndin hevur tó altíð endaligu ábyrgdina av barninum.

Myndugleikin hjá barnaverndarnevndini at taka avgerðir viðvíkjandi barninum er avmarkaður av endamálinum við umsorganaryvirtøkuni. Tær avgerðir, sum barnaverndartænastan kann taka viðvíkjandi viðurskiftunum hjá umsorganaryvirtikna barninum, skulu viðvíkja viðurskiftum, sum tað, við atliti at endamálinum við umsorganaryvirtøkuni, má metast sum neyðugt at taka avgerð um.

Foreldrini varðveita foreldramyndugleikan yvir barninum, meðan tað er umsorganaryvirtikið. Hetta merkir, at tað eru fleiri viðurskifti, sum bara foreldrini í útgangspunktinum taka støðu til. Foreldrini hava sostatt framvegis rætt til at taka avgerðir um eina røð av persónligum viðurskiftum hjá barninum, meðan barnið er umsorganaryvirtikið. Sum dømir um hetta kunnu nevnast spurningar um dóp, navngeving og ferming.

Í ítøkiliga málinum sæst ikki, at nakað serstakt var ásett viðvíkjandi myndugleikanum at virka í peningaligu viðurskiftunum hjá børnunum. Eg dugi ikki at síggja, at vanligi rætturin at ráða yvir peningaligu viðurskiftunum hjá børnunum var ein partur av dagligu umsorganini fyri børnunum, sum tað var neyðugt hjá barnaverndartænastuni at taka avgerð um við atliti at endamálinum við umsorganaryvirtøkuni.

Hinvegin er lummapeningurin, sum kommunan hvønn mánað rindar einum umsorganaryvirtiknum barni, sbrt. § 1, stk. 3 í kunngerð nr. 69 frá 19. mai 2006, fevndur av dagligu umsorganini fyri barninum. Hesin lummapeningur verður tí fluttur á kontu hjá fosturforeldrunum, tilskilaður p-talinum hjá barninum, soleiðis at fosturforeldrini kunnu umsita lummapeningin saman við fosturbarninum.

Út frá upplýsingunum í málinum meti eg, at mamman, sum hevði foreldramyndugleikan yvir børnunum, hevði myndugleikan at virka vegna børn síni í peningaligu viðurskiftunum teirra, hóast børnini vóru umsorganaryvirtikin. Hetta hevði barnaverndartænastan eisini gjørt vart við á fundi við barnið.

Vísandi til omanfyri standandi meti eg ikki, at barnaverndartænastan hevði heimild at biðja um kontuavrit av kontunum hjá umsorganaryvirtiknu børnunum fyri at kanna nýtsluna á kontunum. Barnaverndartænastan átti heldur ikki at upplýst fyri bankunum, at børnini vóru umsorganaryvirtikin, tí talan var um eymar persónligar upplýsingar, sum vóru fevndir av tagnarskyldu, sbrt. § 26, stk. 1 í Fyrisitingarlógini (løgtingslóg nr. 132 frá 10. juni 1993 um fyrisitingarlóg). Eg fari at geva barnaverndartænastuni fyri B kommunu eina átalu fyri hetta.

Viðmerkjast skal, at tá foreldur virka vegna ómyndigt barn í peningaligum viðurskiftum hjá barninum, hava foreldrini skyldu til at røkja áhugamálini hjá barninum, sbrt. § 24 í Vml. Um

foreldur seta skyldur sínar til viks, hava tey, sbrt. § 31 í Vml., endurgjaldsábyrgd yvir fyri ómyndiga barninum fyri skaða, sum tey hava verið atvoldin til, antin tilætlað ella av gáloysni.

Hetta skriv er eisini sent klagaranum og verður í næstum partvíst almannakunngjørt á heimasíðu okkara í navnleysum líki.

Vinarliga

Sólja í Ólavsstovu
Løgtingsins umboðsmaður